# Vinnumálaráðharri vitjaði

Saman við embætisfólki var landsstýrrismaðurin í vinnumálum, Jóhan Dahl, á vitjan í Íverksetarahúsinum í Klaksvík mánadagin. Á fundinum luttóku eisini leiðsla og stjórn í Íverksetarahúsinum og flestu limir í Klaksvíkar býráð saman við umsitingarleiðarum í kommununi. Á skránni var kunning um ítøkiligu ætlanirnar hjá Íverksetarahúsinum framyvir, sum koma at fevna um øll tey størru plássini í landinum. Síðani Íverksetarahúsið byrjaði í 2007, hava millum 600 og700 íverksetar og onnur gjørt brúk av húsinum. Higartil eru 98 verkætlanir skrásettar, sum fevna um millum annað ferðavinnu, ráðgeving, innovatión, undirhald, wellness, patent ráðgeving, sniðgeving, logistikk, menning av telduspølum og øðrum. Av teimum 98 verkætlanunum eru higartil 17 avgreiddar við úrsliti. Íverksetarahúsið hevur higartil haft tiltøk í Suðuroy, Sandoy, Vágum, miðstaðarøkinum, Eysturoy og í Klaksvík. Semja varð um, at Íverksetarahúsið framhaldandi skal virka í øllum landinum, og at land, kommunur og privatir íleggjarar eiga at luttaka í figgingini av vikseminum. Serliga hevur tað týdning fyri tað landsdekkandi virksemið at fáa kommunurnar við.






At enda varð hildið frægast bara at halda fram við avhoyringini.

Hesin parturin av avhoyringini hevði tó mest at gera við konfiskeringina av teimum 135.000 krónunum, og niðurstøðan var helst, at peningurin var at rokna sum eitt lán til Rafik'sa og tí juridiskt ikki longur vóru ogn hjá Farhud Bourbiaa.

### Mótsigandi útsagnir

Heldur ikki Tallell Bel-Ackhal virkaði sum eitt trúverdugt vitni, tí har vóru alt ov mong mótsigandi úttalisli.

Hann byrjaði við at greiða frá, at Rafik'sa umsat peningin sum einhvør annar handil. Kassin varð gjørdu upp um kvøldið, peningurin tikin við til húsa heim, og so settur í bankan einaferð um vikuna.

Um orsøkina til, at pengar vórðu vekslaðir frá føroyskum til danskar seðlar segði Tallell Bel-Ackhal, at tað var tí at Rafik Bourbiaa bað hann, og at hann ikki kendi orsøkina til hetta.

Sera ógreitt var, hvussu og nær broytingin frá at seta regluliga inn einaferð um vikuna, til at veksla umleið einaferð um mánaðin hendi. Seinni gjørdist tað til, at vekslingin bert fór fram, tá Rafik Bourbiaa var í Føroyum. Kortini var dagsins umsetningur lagdur í náttarboksina í Eik Banka hetta famøsa kvøldið 16. juli 2008.

Somuleiðis greiddi Tallell Bel-Ackhal frá í Føroya Rætti, at um hann og Muhammed Bourbiaa ikki vórðu verandi í Føroyum og arbeiddu fyri Farhud Bourbiaa, eftir at hesin hevði yvirtikið pizzariaið, so vildi Rafik Bourbiaa drepa teir og senda teir aftur til Tunesia í líkvognum.

Í Eystara Landsrætti segði hann, at hann einki hevði ímóti at arbeiða undir Farhud Bourbiaa, og at hann einki hevði hoyrt um, at talan var um, at Farhud skuldi yvirtaka Rafik'sa.

Eisini fleiri aðra staðni hevði hann ilt við at forklára seg, og eingin spurdi nakað um, hví hann fyri hálvumøðrum mánaði síðani kom aftur til Føroya og Rafik Bourbiaa, tá hann bara stutt framman undan var flýddur yvir háls og herðar undan sama manni.

Men alt hetta fæst vælsaktans eitt svar upp á, tá Eystari Landsrættur kemur aftur til Føroya í mars, tí málið kemur fyri aftur hósdagin 12. mars 2009.

Dómararnir mettu nevniliga, at Muhammed Bourbiaa er eitt so mikið týdningarmikið vitni, at hann átti at hoyrast í rættinum.

## Málið í stuttum

16. juli koma Rafik og bróðurin Farhud Bourbiaa til Føroya úr Svøríki, umvegis Danmark.

Bróðursonur teirra, Muhammed Bourbiaa, er á flogvøllinum eftir teimum, og teir koyra til Runavíkar til pizzariaið Rafik'sa, sum Rafik Bourbiaa eigur. Allir partar eru samdir um, at stemningurin har er góður.

Tá latið er aftur, fara teir fýra nevndu og systursonur teir báðar brøðurnar, Tallell Bel-Ackhal, til húsar heim í Søldarfirði. Og her er tað, at frágreiðingarnar skiljast at. Tí meðan Rafik, Farhud og nú fyri ein part eisini Muhmmed Bourbiaa siga, at teir tosa stilt og friðarligt saman, so pástendur Tallell Bel-Ackhal, sum nevnt nú eitt sindur einsamallur, at Rafik Bourbiaa ákærdi teir báðar fyri at hava nápað av kassanum, og at hann krevur peningin aftur, samstundis sum hann gerst í øðini og hóttir við at drepa teir.

Tallell og Muhammed fara síðani til songar. Tallell Bel-Ackhal greiðir í Eystara Landsrætti frá, at hann morgunin eftir ringir til Muhammed, og tá hesin fer at tosa um pass, fer Tallell at leita eftir sínum og varnast, at tað er burtur. Tá gerst hann nærum frá sær sjálvum av ræðslu.

Frágreiðingin hjá Muhammed (og Tallell) var nakað annaðleiðis í Føroya Rætti, tí tá tóktust frágreiðingarnar samsvara við, at Tallell fyrst varnast, at passið er burtur, og síðani ringir til Muhammed og greiðir frá hesum.

Heldur ikki er samsvar um, hvat síðani hendir seinni í pizzarianum. Tallell sigur, at Muhammed letur allar huðrar upp, og sjálvur stendur í einari, meðan Tallell er meiri mitt inni í rúminum. Síðani greiðir Tallell frá, at Muhammed rópar um passið og so knappliga tekur beinini á nakkan, og Tallell síðani aftan á.

Hinir tríggir eru samdir um, at Tallell Bel-Ackhal tosar við Rafik Bourbiaa, tá hann krevur at fáa passini. Júst hvat Rafik svarar er ósemja um, men knappliga rópar Tallell eitthvørt niðursetandi og flýgur á dyr – Muhammed aftaná.

Hvussu er og ikki, so er talan um eitt torskilt mál, sum illa kann loysast við einum pennastroki, og helst als ikki, so leingi Muhammed ikki verður fyrihildin nýggju støðu sína. Og tað verður møguleiki fyri hósdagin 12. mars 2009.